# Toppliðini fingu øll fulla úrtøku

**Fyri fyrstu ferð skoraði brasilski álopsspælarin hjá FCK tvær ferðir í einum og sama dysti**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tað hilnaðist væl hjá fýra teimum fremstu í superliguni, tá ið næstsíðsta umfarið undan vetrarsteðginum var á skránni í vikuskiftinum. Næsta vikuskifti fer superligan í vetrarfrí. Leygardagin skulu FC Nordsjælland og AGF spæla, og sunnudagin verður spælt soleiðis: Herfølge–Viborg, FCK–AB, Esbjerg–OB, FC Midtjylland–Frem og AaB–Brøndby.

Brøndby er framvegis oddalið, men tað stóð nógv á, áðrenn teir á heimavølli frammanfyri 20 túsund áskoðarum tryggjaðu sær øll stigini. Peter Foldgast, sum eisini skoraði hósdagin ímóti Schalke 04, hevði dygst frá málstrikuni síðsta fótin á. Harvið varð staðfest, at teir í Brøndby vóru ikki troyttari enn so, eftir glæsiliga úrslitið í UEFA Cup hósdagin, at teir høvdu orku til at vinna.

Longu í 1. hálvleiki áttu teir at havt skorað eini fýra mál. Men teir fingu bara eitt, og so gjørdist tað rættuliga spennandi, tá ið FC Nordsjælland, sum stríddist rættuliga væl, eftir steðgin javnaði.

Esbjerg er framvegis næstfremst – trý stig aftanfyri oddaliðið. Tá ið teir í Esbjerg leygardagin høvdu vitjan av AaB, bendi einki á, tá ið tað var hálvleikt, at heimaliðið ikki skuldi vinna tryggan sigur. Teir vóru frammanfyri 2–0. Men í handavending skoraði AaB tvey mál, og so var tað spennandi. Tommy Bechmann verður roknaður at vera týdningarmesti álopsspælarin hjá Esbjerg. Næsta ár skal hann spæla í Týsklandi, og nú verður undrast á, hvussu Esbjerg skal standa seg uttan hann. Ungi maðurin skoraði til 3–2, og hann legði upp til tvey av hinum málunum í 4–2 sigrinum.

FCK stendur seg betri á útivølli enn í Parkini. Hagtølini siga, at í heyst hava teir vunnið seks ferðir á útivølli og spælt tríggjar ferðir javn. Í Parkini hava teir tapt tríggjar ferðir í tíggju royndum. Í Viborg var talan um stórt FCK mannfall. Umframt Toda, Mykland og hinar, sum hava verið skaddir í nógvar vikur, so var Zuma ikki við, og Tøll var á beinkinum fyrsta tíman. Álvaro Santos og Peter Møller vóru í álopinum. Santos skoraði bæði málini í 2–0 FCK sigrinum. Tað fyrra við góðum langskoti tá ið 1. hálvleikur var um at vera liðugur, og tað seinna fyri púra opnum máli, tá ið seinna umfarið var tríggjar minuttir gamalt.

OB vann 2–1 á heimavølli ímóti illa stadda Frem. OB venjarin metti, at sigurin var væl og virðiliga uppiborin, meðan Ebbe Skovdal iðraði seg um, at teir ikki høvdu gjørt størrri nyttu burturúr fleiri uppløgdum málmøguleikum.

Í Århus er fótbóltslagið heilt gott, eftir at svenski venjarin, Sören Åkeby, í fýra teimum fyrstu dystunum hevði vunnið tíggju stig. 11.121 vóru á Århus stadion, og tey fóru vónbrotin aftur til hús. Herfølge, sum er í stórari kreppu, tí formaðurin í nevndini og stjórin eru í opnum kríggi í fjølmiðlunum, vann 3–1, eftir at heimaliðið hevði verið frammanfyri 1–0.

Í Gladsaxe megnaði heimaliðið at vinna seg upp á 3–3, eftir at FCM hevði verið frammanfyri 3–1. Hetta var sætta ferðin á rað, at FCM, sum undan kappingarbyrjan miðjaði eftir í minsta lagi fjórða plássinum, fór av vøllinum uttan at hava vunnið.

**Danska superligan**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Brøndby (S) | 19 | 14 | - | 3 | - | 2 | 34 | 13 | 21 | 45 |
| 2 Esbjerg | 19 | 13 | - | 3 | - | 3 | 36 | 18 | 18 | 42 |
| 3 FCK (M) | 19 | 10 | - | 6 | - | 3 | 28 | 15 | 13 | 36 |
| 4 OB | 19 | 10 | - | 4 | - | 5 | 38 | 27 | 11 | 34 |
| 5 AaB | 19 | 8 | - | 5 | - | 6 | 29 | 26 | 3 | 29 |
| 6 FCM | 19 | 7 | - | 4 | - | 8 | 32 | 28 | 4 | 25 |
| 7 AGF | 19 | 7 | - | 2 | - | 10 | 28 | 40 | -12 | 23 |
| 8 Viborg | 19 | 5 | - | 6 | - | 8 | 30 | 29 | 1 | 21 |
| 9 Herfølge | 19 | 5 | - | 5 | - | 9 | 21 | 27 | -6 | 20 |
| 10 FC Nordsj. | 19 | 4 | - | 6 | - | 9 | 24 | 35 | -11 | 18 |
| 11 Frem | 19 | 4 | - | 2 | - | 13 | 19 | 36 | -17 | 14 |
| 12 AB | 19 | 3 | - | 2 | - | 14 | 16 | 41 | -25 | 11 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK), Jón Rói Jacobsen (Brøndby)

**Skotska Premier League**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Celtic | 14 | 13 | - | 1 | - | 0 | 46 | 5 | 41 | 40 |
| 2 Rangers | 14 | 11 | - | 2 | - | 1 | 37 | 11 | 26 | 35 |
| 3 Hearts | 14 | 8 | - | 2 | - | 4 | 22 | 17 | 5 | 26 |
| 4 Motherwell | 14 | 5 | - | 5 | - | 4 | 17 | 17 | 0 | 20 |
| 5 Dunfermline | 14 | 5 | - | 5 | - | 4 | 16 | 19 | -3 | 20 |
| 6 Livingston | 14 | 4 | - | 6 | - | 4 | 15 | 15 | 0 | 18 |
| 7 Dundee | 14 | 4 | - | 5 | - | 5 | 15 | 16 | -1 | 17 |
| 8 Kilmarnock | 14 | 5 | - | 2 | - | 7 | 20 | 30 | -10 | 17 |
| 9 Hibernian | 14 | 4 | - | 4 | - | 6 | 14 | 20 | -6 | 16 |
| 10 Dundee Utd. | 14 | 3 | - | 4 | - | 7 | 12 | 27 | -15 | 13 |
| 11 Aberdeen | 14 | 2 | - | 2 | - | 10 | 11 | 29 | -18 | 8 |
| 12 Partick | 14 | 0 | - | 2 | - | 12 | 12 | 31 | -19 | 2 |

Føroyskir leikarar: Jákup Mikkelsen (Partick)

**Danska TDC-ligan**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 GOG | 10 | 9 | - | 0 | - | 1 | 338 | 247 | 91 | 18 |
| 2 KIF | 10 | 9 | - | 0 | - | 1 | 313 | 258 | 55 | 18 |
| 3 AaB | 10 | 8 | - | 0 | - | 2 | 290 | 241 | 49 | 16 |
| 4 Tvis | 10 | 7 | - | 0 | - | 3 | 234 | 227 | 7 | 14 |
| 5 Skjern | 10 | 6 | - | 0 | - | 4 | 281 | 261 | 20 | 12 |
| 6 Fredericia | 11 | 6 | - | 0 | - | 5 | 298 | 291 | 7 | 12 |
| 7 Århus GF | 10 | 5 | - | 0 | - | 5 | 312 | 306 | 6 | 10 |
| 8 Bjerringbro | 10 | 4 | - | 1 | - | 5 | 204 | 211 | -7 | 9 |
| 9 FCK | 10 | 3 | - | 1 | - | 6 | 255 | 260 | -5 | 7 |
| 10 Ajax | 10 | 3 | - | 0 | - | 7 | 240 | 262 | -22 | 6 |
| 11 Helsinge | 10 | 3 | - | 0 | - | 7 | 260 | 288 | -28 | 6 |
| 12 TMS | 10 | 3 | - | 0 | - | 7 | 213 | 263 | -50 | 6 |
| 13 Silkeb.-Voel | 11 | 2 | - | 0 | - | 9 | 266 | 316 | -50 | 4 |
| 14 Otterup | 10 | 2 | - | 0 | - | 8 | 212 | 285 | -73 | 4 |

Føroyskir leikarar: Heini Hanusarson (TMS)

# Partick meiri avbyrgt

**Hea ferð løgdu teir rygg til tap á útivølli ímóti toppliðnum, sum hevði Chris Sutton og Henrik Larsson sum málskjúttar**

SKOTLAND
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tað tykist ikki sum um, at Partick Thistle skal megna at vinna í hesum kappingarárinum. Leygardagin var uppgávan kortini ríkiliga stór. Teir vóru á útivlli ímóti oddaliðnum Celtic, og teir í stórfelagnum vístu onga náði ímóti lítla býarfelagnum. Partick stríddi seg upp á 1–1, men heimaliðið vann 3–1. Partick hevur framvegis bara tvey stig.

Aberdeen, sum er næstaftast, fekk 2–2 á útivølli ómóti Dunfermline, so frástøðan til bjargingina gjørdist størri hjá Partick Thistle. Jákup Mikkelsen var enn eina ferð á beinkinum.

Í Skotlandi varð í síðstu viku tosað nógv um, at Partick Thistle venjarin skuldi fáa sekkin. Hann fekk ein møguleika afturat, men nú man línan hjá honum vera rættuliga kløn.









## Góðir brúktir bilar

**Nissan Almera 2.0 diesel** grønur, árg 1999, 4 hurðar, fyrr 115.000,- **nú 89.000**

**Opel Vectra 1.7 DT** grønur, árg 1995, 4 hurðar, km. 210.000 **65.000**

**Nissan Almera 1.4 S** gráur, árg 1999, 5 hurðar, km. 48.000 **97.000**

**Opel Vectra 1.7 DT** reyður, árg 1996, 4 hurðar, km. 195.000 **79.000**

**Nissan Almera 2.0 Diesel** vínreyður, árg 1999, 4 hurðar, km. 61.000 **nú 89.000**

**Opel Vectra 1.7 DT** bláur, árg 1996, 5 hurðar, km. 125.000 **85.000**

**Nissan Almera 1.6 GX** vínreyður, árg 2000, 4 hurðar, km 88.000 **nú 95.000**

**Ssangyong Musso 2.9D 100 HK Van** grønur, árg 1997, 5 hurðar, km. 102.000 **130.000**

**Peugeot 206 XS 2.0 Hdi** verður seldur fyri kunda, svartur, 3 hurðar, árg 2002, km. 35.000 **145.000**

**Jeep Cherokee 2.5DT persónbilur** grønur, árg 1995, 5 hurðar, km. 101.000 **155.000**

**Peugeot 306 Diesel Turbo** gráur, árg. 1995 4 hurðar, km. 206.000, toppstykkið skift **nú 45.000**

**Ford Fiesta 1.3** reyður, árg 1997, km. 88.000 **46.000**

**Peugeot 406 1.8** grønur, árg. 1997, 4 hurðar, km. 129.000 **99.000**

**Ford Escort 1.8d** bláur, árg 1997, 5 hurðar, km. 127.000, fyrr 57.000,- **nú 35.000**

**Peugeot Boxer 320MH 2.5 Diesel** hvítur, árg 2000, km. 107.000 **v/mvg 142.000**

**Ford Escort 1.8** bláur, árg 1995, 4 hurðar, km. 101.000 **59.000**

**Opel Agila** grønur, árg 2001, 5 hurðar, km. 36.000, fyrr 110.000,- **95.000**

**Ford Orion 1.8 Diesel** bláur, árg 1991, 4 hurðar, km. 131.000 **25.000**

**Opel Astra 1.6 16V Comfort** vínreyður, árg 2002, 4 hurðar, km. 16.000 **135.000**

**Daewoo Lanos 1.5** reyður, árg 1999, 5 hurðar, km. 53.000, fyrr 79.000,- **nú 62.000**

**Opel Astra 1.6 Station car** hvítur, árg 1996, 5 hurðar, km. 61.000 **68.000**

**Mazda E-serie 2200 Diesel** gráur, árg 2002, 5 hurðar, km. 17.000, skrásettur sum persónbilur **v/mvg 175.000**

**Opel Astra 1.4** bláur, árg 1992, 5 hurðar, km. 145.000 **39.000**

**Toyota Corolla 1.3 XLi** reyður, árg 1997, 3 hurðar, km. 79.000 **67.000**

**Opel Astra 1.7 DT** grønur, árg 1997, 4 hurðar **65.000**

**Toyota Carina E 1.6** hvítur, árg 1995, 4 hurðar, km. 138.000 **67.000**

**Opel Astra 1.6 16V** gráur, árg 2001, 4 hurðar, km. 27.000 **120.000**

**Toyota Corolla 1.3 XL** reyður, árg 1997, 3 hurðar, km. 146.000 **59.000**

**Opel Astra 1.7 DT** grønur, árg 1999, 5 hurðar, km. 97.000 **119.000**

**Toyota Corolla 1.6 Star Linia Terra** grønur, árg 2002, 5 hurðar, km. 18.000, seldur fyri kunda **160.000**

**Opel Astra 1.6 Comfort** svartur, árg 1998, 5 hurðar, km. 77.000 **95.000**

Sosialurin 341800

Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir
Fyrispurningar kunnu vera settir á telefon 34 54 00,
eisini ber til at senda teldupost til: nissan@nissan.fo
Bilarnir finnast eisini á: www.nissan.fo

**P/F Meinhardt Arge**
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171 • 110 Tórshavn • Tel. 31 61 61


**Aflysning av tvangsauktion**

Tvangsauktionen over matr. nr. 862 g Tórshavn, berammet til fredag den 5. desember 2003 kl. 9.15, aflyses hermed.

**Jóannes Madsen**
dommerfuldmægtig


Lýsið við brúktum bilum



Sosialurin
www.sosialurin.fo


Team85 358000

## Búmerkjakapping

**Novena Tours**, ið heldur til í Saltangará, bjóðar hervið til almenna kapping um búmerki til felagið.
Novena Tours ein ferðaskrivstova, ið veitir alt slag av ferðatænastum. Ferðaseðlar - bæði loftvegis og sjóvegis, kring um í heiminum. Ferðaskrivstovan heldur til í Saltangará og ætlanin er, fyrst og fremst, at veita tænastur til nærumhvørvið í Eysturoy.

**Kravið til** búmerkið er, at tað á einfaldan og beinraknan hátt lýsir virksemið felagsins. Uppskot skulu vísa búmerkið í ymiskum støddum og við dømum um samanseting av búmerki og virkisnavni. Uppskot skulu harafturat lúka faklig krøv til prent í litum og svørt/hvítum.

**Vinnandi** uppskotið fær virðisløn áljóðandi tveir APEX ferðaseðlar frá Maersk Air, millum Keypmannahavn og Føroyar.
Novena Tours tilskilar sær rætt til frítt at velja millum uppskotini, og um so er, at Novena Tours ikki metir nakað uppskot vera skikkað, verður eingin virðisløn latin.

**Uppskot** skulu bera frámerki, í afturlatnum bjálva og verða felagnum í hendi, í seinasta lagi 20. desember 2003.

**Uppskot** skulu sendast til:

**Novena Tours**
Post boks 161
600 Saltangará




BÍLEGG PIZZA
FRÍGGJANÁTT
OG
LEYGARNÁTT



HEIMKOYRING ALLA NÁTTINA

PIZZA 67
TEL. 35 67 67

Sosialurin 341800



## Sølufólk




Vit sóknast eftir einum dugnaligum sølufólki m/k at takast við søluna av føroya besta sodavatni.

Søluroyndir er ein fyrimunur.

Skrivlig umsókn skal sendast til:

Restorffs
Postsmoga 351 · FO-110 Tórshavn
Tel 314728 · restorff@post.olivant.fo

Sosialurin 341800